# 50 mió til orku sparing

Fólk í Grønlandi fáa nú møguleikar fyri at søkja um serlig lán, um tey ætla at umbyggja ella umvæla húsini ella íbúðina, so tey brúka minni orku. Tað er Grønlandsbankin, sum kemur við tilboðnum.



Bankin hevur lænt 25 milliónir krónur frá Norðurlendska Íløgubankanum (NIB), og tá bankin sjálvur leggur aðrar 25 milliónir krónur omaná, hevur hann 50 milliónir krónur til endamálið.

Peter Petersen, sum er stjóri í privatkundadeildini hjá Grønlandsbankanum, sigur við grønlendska kringvarpið, at fólk kunnu læna upp til 200.000 krónur til orkusparandi umvæling ella umbygging av húsunum ella íbúðini. Tað er tó greitt, at øll hava ikki brúk fyri at læna 200.000 krónur, og tí væntar bankin, at tær 50 milliónir krónurnar fara at røkka til millum 300 og 400 hús og íbúðir.

Tað serliga umhvørvisláníð hjá Grønlandsbankanum kann brúkast til eitt nú betri bjálving, nýtt oljufýr, fjarhitaskipan, vatnpumpur og sólarhita.



## Rútmiskir musikkskúladagar

Tórshavnar Musikkskúli skipar á hvørjum ári fyri Rútmiskum Musikkskúladøgum sum hesaferð verður á Studentaskúlanum í Hoydølum. 10 bólkar fara at framføra tónleik sum antin bleiv framførdur, ella hevur tilknýti til Woodstock Tónleikafestivalin sum var hildin summarið 1969.

Upp í móti 500.000 ung komu saman at lurta, dansa og festa hetta vikuskiftið, har teir kendastu rokkbólkarnir spældu.

Hetta bleiv tann kendasti og mest umtalaði tónleikafestivalurin nakrantíð og sjálvt um næstan ein hálv mill ung vóru samlaði á festivaløkinum, var eingin harskapur framdur. Woodstock gjørdist ímyndin av kærleika, vón og friði, í eini tíð við kríggi og politiskum turbulensi. Hetta verður ein litrík og fjølbroytt konsert við rock, funk, soul og fólkatónleiki.

# Ein glaður formaður

**ARGJA KIRKJA Nú er kirkjuráðið á Argjum komið um fyrsta snávingarsteingin í ætlanini at byggja nýggja kirkju við Sandá**



*Bjartur Dalsgarð er formaður í kirkjuráðnum á Argjum*

Áki Bertholdsen

– Eg eri ein ómetaliga glaður maður í kvøld.

Bjartur Dalsgarð, formaður í kirkjuráðnum á Argjum, dylir ikki, hvussu fegin hann er, nú Býráðið hevur samtykt at gera eina serstaka byggisamtykt fyri stykkið ímillum Støðlagøtu og Sandá, har ætlanin er at byggja nýggja kirkju.

Hann staðfestir, at hóast tey formligu viðurskiftini ikki eru avgreidd enn, metir hann avgerðina hjá býráðnum í kvøld sum eitt stórt stig fram á leið ímóti eini nýggjari kirkju við Sandá.

- Vit taka hetta sum eina politiska avgerð um at slóða fyri at byggja eina kirkju á einum stykki, sum býráðið sjálvt hevur ávíst okkum at byggja á, sigur hann.

Les meiri um sama evni á síðu 4

# Sjey ímóti seks

**ARGJA KIRKJA Tað var við teprasta meiriluta, sum hugsast kundi, at Tórshavar býráð í gjár samtykti at broyta byggisamtykt á Argjum**



Áki Bertholdsen

Tað var við teprasta meiriluta, sum hugsast kann, at Tórshavnar Býráð ígjárkvøldið samtykti at gera eina serstaka byggisamtykt fyri eitt stykkið ímillum Sandá og Støðlagøtu so at tað ber til at byggja nýggja kirkju á stykkinum, sum er 4000 fermetrar til støddar.

Tað vóru nevniliga bara sjey býráðslimir fyri at broyta byggisamtyktina og seks atkvøður vóru ímóti.

Tey, sum atkvøddu fyri at broyta byggisamtyktina, so at kirkja kann byggjast á stykkinum, vóru:

*Jan Christiansen*
*Heðin Mortensen*
*Bogi Andreasen*
*Jákup Símun Simonsen*
*Annfinn Brekkstein*
*Inga Dahl*
*Vagnur Johannesen*

Tey, sum atkvøddu ímóti vóru og vildu varðveita fríøkið, vóru:

*Rúni Djurhus*
*Elin Lindenskov*
*Halla Samuelsen*
*Jógvan Arge*
*Marin Katrina Frýdal*
*Levi Mørk*

Tað var spenningur um atkvøðugreiðsluna heilt til tað síðsta, tí hóast tað var greitt, at tað fór at ríða um snarið, visti ongin, hvønn veg, tað fór at koppa.

Átta býráðslimir høvdu orðið í málinum og av teimum vóru fimm ímóti. Sostatt vóru tríggir ímóti, men greitt varð eisini, at Bogi Andreassen, býráðslimur, tók undir við ætlanini at broyta byggisamtyktina, hóast hann ikki hevði orðið.

Hinvegin varð eisini greitt, at Rúni Djurhus var ímóti ætlanini, hóast heldur ikki hann hevði orðið.

Sosatt stóð og fall málið við, hvørja støðu, Vagnur Johannesen, Inga Dahl og Annfinn Brekkstein tóku, men tá ið tey øll atkvøddu fyri, varð málið samtykt við 7-6

Les meiri um sama evni á síðu 4.